Nils Sørensen her saman við Graham Stewart, stovnara og stjóra í Faroe Petroleum.

Føroya Kolvetni letur skrivstovuna í Føroyum aftur

Jan Müller

04.11.2015 - 16:38

Oljan.fo

Føroya Kolvetni, ið er dótturfelag hjá Faroe Petroleum plc., letur nú skrivstovuna í Føroyum aftur, tí felagið einki virksemi hevur í Føroyum longur. Í hesum sambandi leggur Nils Sørensen frá sær eftir 18 ár sum stjóri í felagnum.

Føroya Kolvetni hevur verið virkið á føroyska landgrunninum og hevur luttikið í fleiri boringum og leitiloyvum bæði sum partnari og fyristøðufelag.

Felagið setti eisini á stovn Atlantic Supply Base, sum hevur veitt tænastur til allar boringarnar á landgrunninum.

Móðurfelagið, Faroe Petroleum plc, heldur fram við sínum virksemi í Bretlandi og Noregi og væntar at framleiða góðar 10.000 tunnur av olju um dagin í 2015.